# Mladic er í Serbia



Amerikanski diplomaturin Raffi Gregorian, sum er altjóða umboðsmaður í Bosnia-Hersegovina, vil vera við, at tann eftirlýsti bosniaserbiski generalurin Ratko Mladic fjalir seg í Serbia. Raffi Gregorian sigur við bosnisku tíðindastovuna FENA, at Mladic fær hjálp frá vinum og kenningum til at fjala seg. Serbiska stjórnin hevur fleiri ferðir sagt, at hon veit ikki, hvar Ratko Mladic er. Krígsbrotsmannadómstólurin fyri gamla Jugoslavia hevur skuldsett fyrrverandi generalin fyri fólkamorð og brotsverk ímóti mannaættini í borgarakrígnum í Bosnia frá 1992 til 1995 og krevur at fáa hann útflýggjaðan.

# Fleiri jarðskjálvtar

Bara átta dagar aftan á jarðskjálvtan í Haiti hava tríggir jarðskjálvtar afturat verið á vestaru jarðarhálvu. Í gjárkvøldið var ein jarðskjálvti við kyrrahavsstrondina í miðamerikanska landinum Guatemala. Hann var 6,0 á Richter-stiganum, men skaði var eingin, skrivar AP. Nakrar tímar frammanundan skrásetti jarðfrøðistovnurin í Argentina ein jarðskjálvta í Andesfjøllunum. Hann var 5,5 á Richter-stiganum, men heldur ikki haðani er frætt um nakran skaða. Fyrradagin skrásetti argentinski jarðfrøðistovnurin ein jarðskjálvta undir havbotninum úti fyri eysturstrondini. Hann var 6,3 á Richter-stiganum, men gjørdi ongan skaða.

# Merkið hevur nú heiðurspláss á Føroya løgtingi

**- Tjóðin savnast undir flagginum, og Merkið er ímyndin av tjóðini - í gleði eins væl og í sorg. Tí er hetta eitt av teimum málum, sum eg gleðist mest um í míni tíð sum løgtingsmaður, sigur Kári P. Højgaard**

MERKIÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Nú hongur føroyska Merkið á løgtingi, eins og merkini gera hjá hinum báðum londunum í útnorði, Íslandi og Grønlandi*
*Mynd: Kári P. Højgaard*

Í dag hongur føroyska flaggið fyri fyrstu ferð í tingsalinum, eftir at løgtingið í heyst við teprum meiriluta samtykti, at Merkið skal hava sítt pláss á tingi.

Tað var Sjálvsstýrisflokkurin, sum 3. august í fjør legði uppskot til samtyktar fyri løgtingið um at fáa flaggið í tingsalin.

Nógv umrøða var av hesum máli, men við teprum meiriluta samtykti løgtingið umsíðir, at Merkið skal hava sítt pláss í tingsalinum.

## Fegin formaður

Kári P. Højgaard, formaður í Sjálvstýrisflokkinum, sigur, at hetta er eitt mál, sum hann gleðist eina mest um í síni tíð sum løgtingsmaður.

- Hini londini í útnorði, Ísland og Grønland, hava síni fløgg í tingsalinum, og í mínari verð er tað ófatiligt, at tað skal hava gingið so striltið at fáa okkara Merkið í tingsalin, sigur hann.

Kári P. Højgaard vísir á, at tjóðin savnast undir flagginum, og Merkið er ímyndin av tjóðini - í gleði eins væl og í sorg.

- Eg eri sera fegin um, at Merkið nú er komið í tingsalin, og hetta mál vísir, at tað kann geva úrslit at stríðast, sigur formaður Sjálvsstýrisfloksins.

## Blankt Tjóðveldi

Atkvøðugreiðslan á Føroya løgtingi vísir, at eingin av tinglimum Tjóðveldisins við endaligu atkvøðugreiðsluna atkvøddi fyri uppskotinum um at fáa Merkið í tingsalin.

Kári P. Højgaard hevur ikki hug at gera viðmerkingar til tepru samtyktina, men fegnast heldur um, at Merkið nú hongur í tingsalinum.

- Skal flaggið úr aftur tingsalinum, má ein nýggj løgtingssamtykt taka støðu til tað, leggur formaður Sjálvsstýrisfloksins aftrat.

# Okkara fiskiveiða er burðardygg

FISKIVEIÐA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard, segði í útvarpinum hjá Kringvarpinum í morgun, at fiskiskapurin undir Føroyum er burðardyggur, og at vit tí saman eiga at lata útlendsku fiskakeypararnar vita hetta, so føroyskar fiskavørur ikki verða boykottaðar, eins og vit hava sæð tað við føroyskari hýsu á bretska marknaðinum seinastu tíðina.

Landsstýrismaðurin segði, at føroyska fiskiveiðiskipanin er burðardygg, og at vit tí kunnu lata útlendingar vita, at vit ikki niðurfiska fiskastovnarnar meiri, enn ráðiligt er.

- Fiskiveiða hevur altíð verið skiftandi. Tað vísa fiskiveiðihagtøl langt aftur í tíðina.

Jacob Vestergaard segði, at lond uttan um okkum eisini hava merkt sær, at fiskiveiðan er skiftandi, tó at tey kanska hava fylgt fiskifrøðiligari ráðgeving í enn størri mun enn føroyingar.

- Eg haldi ikki, at royndirnar aðrastaðni hava víst, at tað ber til at goyma fisk, sum hann tók til.

Løgtingsmaðurin, Kári P. Højgaard, hevur sett landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, Jacobi Vestergaard, munnligan fyrispurning um, hvat landsstýrið ætlar at gera, nú føroysk hýsuframleiðsla verður boykottað í Bretlandi.

Spurningarnir hjá løgtingsmanninum eru tríggir í tali.

Í fyrsta lagi vil Kári P. Højgaard hava at vita, hvørji stig politiski myndugleikin saman við vinnuni higartil hevur tikið til tess at kunna útlendskar keyparar av føroyskum fiskavørum, at vit fiska burðardygt.

Í øðrum lagi spyr hann, um landsstýrismaðurin veit, hví hýsa, sum verður veidd undir Føroyum, verður boykottað, samstundis sum hýsa veidd undir Íslandi, verður roknað sum burðardygg, tó at hýsa undan Íslandi ikki hevur góðkenning.

Í triðja og seinasta lagi spyr Kári P. Højgaard, hvørji stig landsstýrismaðurin fer at taka til tess at samskipa vitanina og frøðina á sjógvi og landi, so tilmælini til politisku skipanina eru greið – og at vit saman úteftir marknaðarføra eina burðardygga fiskiveiði.

Á tingfundi í morgin skal landsstýrismaðurin, Jacob Vestergaard, svara løgtingsmanninum, Kára P. Højgaard.

# Toskur stendur fyri stórum parti av søluvirðinum



**Toskur er vorðin ein alsamt veksandi partur av inntøkunum hjá føroyska heimaflotanum. Hetta vísa sølutølini hjá Fiskamarknaði Føroya**

FISKASØLUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fiskamarknaður Føroya seldi í gjár 192 tons av fiski fyri slakar 2,8 miljónir krónur.

Helvtin av øllum nøgdunum - ella eini 100 tons - var toskur, sum fór fyri slakar 2 miljónir krónur tilsamans.

Sølan í gjár vísir, at tó at toskur var helvtin av samlaðu nøgdunum, stóð toskurin fyri meiri enn tveimum triðingum av samlaða søluvirðinum.

36 tons vóru av toski 2, sum fór fyri miðalprísin 25 krónur og 30 oyru - og 38 tons vóru av toski 3, sum fekk miðalprísin 14 krónur og 98 oyru fyri kilo.

Næst størstu nøgdirnar á Fiskamarknaði Føroya í gjár vóru hýsa. Talan var um eini 35 tons, og miðalprísurin á bestu hýsuni var 9 krónur og 46 oyru.

Eini 20 tons vóru av brosmu, sum lá upp ímóti 9 krónum fyri kilo, og eini 13 tons vóru av longu, har besti miðalprísurin var 14 krónur og 38 oyru fyri kilo.

*Samlaða sølan á Fiskamarknaði Føroya í gjár gav slakar 2,8 miljónir krónur. Ein stórur helmingur av seldu nøgdini var toskur, sum stóð fyri meiri enn tveimum triðingum av søluvirðinum*